# Ung í arbeiði



## Tórshavnar kommuna bjóðar ungdóminum arbeiði

Ung í arbeiði er ein verkætlan, har Tórshavnar kommuna bjóðar ungdóminum at gera fyrifallandi arbeiði so sum smáumvælingar, lúka og sópa gøtur, mála og rudda. Arbeiði fæst í tíðarskeiðnum 28. juni-9. juli ella 12. juli-23. juli. Lønin er tann sáttmálaavtalaða tímalønin umframt frítíðarløn.

Kravið er, at tú ert 14 ár 28. juni, men ikki 17 ár 23. juli. Harumframt er treytin, at tú ert búsitandi í Tórshavnar kommunu. Ert tú t.d. í skúla aðrastaðni, men flytur aftur til kommununa í summarfrítíðini, kanst tú eisini søkja.



### Tilmelding

Ert tú til dystin fús, skalt tú melda teg til umvegis www.torshavn.fo í tíðarskeiðnum 25. mai til 6. juni. Teldur eru tøkar á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og á Kunningarstovuni.

### Vit sóknast eftir bólkaleiðarum

Dugir tú at arbeiða við ungdómi, ert ágrýtin, torir at taka avgerðir og ert mitt í tjúgunum ella eldri – so ert tú júst tann, vit sóknast eftir sum bólkaleiðara til Ung í arbeiði.

Kommunan setur eingi krøv um útbúgving, men góður kunnleiki til vanligt anleggsarbeiði er ein fyrimunur.

Bólkaleiðarin hevur, saman við samskiparanum, leiðsluna av ungdómunum, ið skulu gera fyrifallandi arbeiði í kommununi.



Starvið verður lønt sambært sáttmálanum millum Havnar Arbeiðsmannafelag og Havnar Arbeiðsgevarafelag. Viðbót verður latin fyri at virka sum bólkaleiðari.

Arbeiðið fevnir um tíðarskeiðið 25. juni til og við 23. juli.

Meira fæst at vita um verkætlanina frá samskiparanum Petur Háberg við at senda teldupost til ungiarbeidi@torshavn.fo

Umsókn skal vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 11. juni 2010. Á heimasíðuni hjá Ung í arbeiði kanst tú søkja um starv sum bólkaleiðari. Tú kanst eisini senda umsóknina við telduposti til ungiarbeidi@torshavn.fo ella til Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn. Merkjast skal á brævbjálvan »Bólkaleiðari Ung í arbeiði 2010«.

**Tórshavnar kommuna**

**MARGARINFABRIKKIN**
VIRKISHÚSIÐ FYRI BØRN OG UNG